**Missión:**

At Klaksvíkar sjúkrahús er ein stovnur, ið sær til, at sjúklingurin fær best møguliga hjálp og ráðgeving á stovninum sjálvum, men at vit eisini kenna okkara ábyrgd, um sjúklingurin verður sendur aðrastaðir til viðgerðar.

**Visión**

At Klaksvíkar sjúkrahús livir upp til umdømið, har sjúklingar, starvsfólk og onnur viðskiftafólk, framhaldandi eru nøgd við okkara avrik. Eitt avrik, ið skal avspegla ein starvsfólkabólk við høgum fakligum førleika, empati, og virðing. Dygd og áræði skal eyðkenna starvsfólkaliðið.

**Virðir:**

- Yrkisførleiki
- Virðing
- Ábyrgd
- Fleksibilitet
- Álit

**Vit vilja vera kend fyri:**

- At vera opin
- Empatisk
- Vælskipaði og hava dagførdar skipanir
- Yrkisliga dygd
- Dugnalig starvsfólk, sum hava sjúklingin í miðdeplinum
- Nøgdar sjúklingar
- Eitt gott arbeiðispláss
- Eitt lærandi umhvørvi
- At vera nýhugsandi
- At vera samstarvs- og samskiftissinnaði
- Útvenda mentan

**Strategi:**

Skulu málini og visjónirnar røkkast, er neyðugt at vit áhaldandi fokusera á neyðugar broytingar, betraðar sjúklingagongdir og betra um samskifti við sjúklingar og avvarðandi, t.d. við implementering av standardum. Betra um útbúgvingarstøðið hjá starvsfólkunum og at førleikamenning sum heild er í fokus.